# Tað kundi verið so gott



Abba Showið savnaði sera nógv fólk á Vágsbøi, og hóast gott lag, frálíkt veður og eitt sera flott show, góðar tónleikarar og serstakliga pen og væl syngjandi fólk, so varaði nærum ein tími, áðrenn veruligt lív kom í fjøldina, og tá var næstan ov seint.

Hóast bólkurin spældi fleiri av heilt stóru hittunum, so sum "Money, Money, Money", "Fernando" og "Take a Chance on Me" so var skráin ov nógv merkt av friðaligum løgum, og løgum, ið fólk kanska ikki kendu heilt so væl. Tá ljóðmaðurin valdi at hava ljóðið sera spakuligt fyrsta tíman, so fór luftin úr ballónini. Ikki nokk við, at ljóðið var spakuligt, ljóðblandi var eisini sera hvast, við lítlum botni.

Men eftir ein góðan tíma tykist tað, sum ljóðmaðurin hevði funnið volumu-knøttin og í løgunum "Dancing Queen", "Mama Mia", "Gimme Gimme" var gott lív í frammanfyri pallin. Hetta var tó ov seint til at fáa allan Vágsbø við. Sum ummælari sat eg við kensluni av, at hetta kundi verið so gott, men gjørdist bara heilt ok. Eg føldi stutt sagt ikki diskoið í mínum æðrum.

# Malplaceraður poppur

**Hóast eg møguliga eri ógegnigur, tí lítlasystirin syngur í bólkinum, fari eg kortini at ummæla Faroe 5. Orsøkin er heilt einkult, at tær so dyggiliga hava uppiborið tað, eftir eina rimmar framførslu tíðliga leygardagin**

UMMÆLI
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*

Vágsbøur var leygardagin karmur um eitt poppshow, ið telist millum mest gjøgnumførdu framførslurnar á Summar Festivalinum í ár. Tað var stórt spell, at ungu genturnar vóru settar á so tíðliga um dagin, tí orkan á pallinum og tónleikurin høvdu uppiborið eina betri fjøld, enn hana, ið var á Vágsbø leygardagin klokkan 15. Framførslan var so mikið góð, at eg freistist at kalla hana fyri at vera á altjóða støði. Í øllum førum á hægri støði, enn okkurt av altjóða nøvnunum á festivalinum.

## Frálík framførsla

Faroe 5 hava tikið seg ótrúliga nógv framm hetta síðsta árið, og tað, sum kundi verið eitt ordiligt hæddarpunkt fyri bólkin higartil, gjørdist eitt lítið vónbrot, tí fjøldin á Vágsbø var bæði lítil og merkt av timburmonnum, tá ungu genturnar, saman við Thor Simonsen og bólki, leveraðu eina einastandandi gjøgnumførda framførslu. Genturnar sungu reint, koreografiin riggaði sera væl, og við Henning Nicodemussen á trummum og Leivi Thomsen á guitar, gjørdist talan um eina livandi, pumpandi framførslu. Eisini Kári Jacobsen var við á pallinum, har hann tók sær av tangentunum.

## Undirmettur poppur

Løgini hjá Faroe 5 hava verið




heilt nógv frammi, og fólk flest kunnu syngja við til tey flestu. Hetta átti at verið nóg góð orsøk til at sett tær á skránna seinni um kvøldið, tí poppur av tí slagnum, sum tær spæla, egnar seg ikki at blíva framførdur tíðliga um dagin, áðrenn flestu festivalgestirnir eru vaknaðir. Um fyrireikarnir hugsa um børnini, tá teir seta Faroe 5 so tíðliga um dagin, so má eg siga, at teir undirmeta tónleikin hjá teimum, tí talan er hóast alt um rættuliga frískan og frekan popptónleik, ið talar meira til ung og vaksin, enn børn. Ein keðiligur endi á einum summarið, ið kundi verið so stórt fyri genturnar.